# NØVN Í VIKUNI

Telefon 341800 - Fax 341801 - Fartelefon 216135
e-mail: maggi@sosialurin.fo

Á hesum síðum bera vit tíðindi um merkisdagar, so sum rundar føðingardagar, brúdleypsdagar, starvssetanir o.t.

## Thorbjørn Lisberg 85 ár

Hósdagin 9. feb verður Thorbjørn Lisberg í Trongisvági 85 ár.



Thorbjørn er ættaður úr Fámjin, sonur Marin Marlenu og Johan Lisberg í Smiðjuni. Tey áttu 16 børn, og var Thorbjørn hin 11. í røðini.

Sum flestu ungdómar tá í tíðini fór Thorbjørn sum 14 ára gamal til skips, og mann hann í dag nokk teljast millum teir fáu føroyingarnar á lívi, sum hava verið til fiskiskap við deyðsiglara. Tá ið løgtingið undir seinna heimsbardaga heitti á føroyingar um at fara til Íslands at gera flogvøll fyri bretska hervaldið, var Thorbjørn ein av teimum 250 føroyingunum, sum tóku av hesum møguleika. Eisini sigldi Thorbjørn við skipum, sum sigldu við feskum fiski úr íslandi til bretska marknaðin undir heimsbardaganum.

Í 1943 giftist Thorbjørn við Andreu, f. Sørensen, úr Grundini í Trongisvági.

Stutt eftir at tey giftust, fóru Andrea og Thorbjørn til Íslands at vinna, og vóru tey har í fleiri ár. Tá lá væl fyri at vinna pening í Íslandi, og heimafturkomin keyptu tey sær tvey traðarstykki í Trongisvági, sum tey í 1950 bygdu sær hús á. Tey, sum hava havt samband við Thorbjørn og Andreu, vita, at Ísland og íslendingar hava síðan tíðani hjá grannunum fyri vestan átt serligt pláss í hjarta teirra.

Seinast í fimmtiárunum keypti Thorbjørn sær lastbil, sum hann hevði til fyrst í sekstiárunum. Eftir hetta arbeiddi Thorbjørn sum arbeiðsmaður, seinastu árini áðrenn pensiónsaldur hjá Tvøroyrar Kommunu.

Tónleikurin hevur altíð havt stóran áhuga hjá Thorbirni, og væl liggur fyri hjá honum at yrkja. Hvør kennir ikki landaplágurnar "Eg sjólívið valdi" og "Kom abbi set teg stabba á", sum Thorbjørn yrkti fyri nógvum árum síðani, og sum synirnir báðir, Jens og Marner, hava sungið inn á band. Vakrastur av øllum sangum hansara er óivað "Kvøða til Fámjin", har hann inniliga og vakurt lýsir náttúruna, bygdina og lívið soleiðis sum hann minnist tað, í eini av vakrastu bygdum í landinum. Og óteljandi eru teir sangir sum Thorbjørn hevur yrkt til veitsluhald av ymiskum slag.

Hann sum ikki veit betur, heldur ikki tað ber til at Thorbjørn er náddur "kempualdur", so virkin sum hann er. Hann hevur í fleiri ár verið formaður í pensionistafelagnum HØFT, sum hann er vorðin víðakendur fyri at hava skipað fyri fleiri ferðum uttanlands saman við. Eisini er hann við, tá ið føroyskur dansur er í oynni, og eru lokalu dansifeløgini boðin onkustaðni á dansiferð, so kann ein verða vísur í at Thorbjørn er við, eisini um tað snýr seg um dansiferð uttanlands.

Thorbjørn og Andrea, sum andaðist í 2001, 81 ára gomul, fingu trý børn, eina gentu sum doyði bert fáar dagar gomul og so synirnar Jens og Marner. Jens er giftur Guðrið og eiga tey børnini Tórbjørn, Kristel og Hávard, sum andaðist í ferðsluvanlukku í 1999, 19 ára gamal.

Marner er giftur Hjørdis og eiga tey døturnar Dianu og Anitu.

Vit eru mong, ið ynskja Thorbjørn tillukku við teimum 85 og góðan byr framyvir.

Føðingardagin er Thorbjørn burturstaddur.

## Andlát og jarðarferðir

**Svenning Holm Lindenskov**, fyrrverandi vitapassari, **Nólsoy**, andaðist á Ríkissjúkrshúsinum týsdagin 7. februar, 69 ára gamal. Jarðarferin verður lýst seinni.

**Hjørdis Johannesen, fødd Skaale**, andaðist á Lágargarði, í gjár, 93 ára gomul.
Jarðarferðin verður úr kirkjugarðs kapellinum leygardagin kl. 13. Tey, ið vilja minnast Hjørdis, kunnu lata eina peningagávu til Lágargarð, konta í peningastovninum.

**Teddy Michelsen, Tvøroyri**, andaðist á Suðuroyar Sjúkrahúsi leygardagin 4. februar, 77 ára gamal. Farið verður úr kapellinum á Suðuroyar Sjúkrahúsi mikudagin kl. 18. Jarðarferðin verður hósdagin klokkan 13 úr Salem á Tvøroyri. Tey, ið vilja minnast Teddy, kunnu lata eina gávu til Salem, Tvøroyri, konta í peningastovninum.

**Dagurin í morgin**

**9. februar. Appolonia**, deyð umleið ár 250. Ein kona í Aleksandriu, sum fyri trúar sakir varð pínd og dripin. Halgisøgan sigur, at hon fekk allar tenninar trektar út og varð síðani brend á báli. Hon er verndarhalgimenni hjá tannlæknum. Navnið er eftir grikska gudinum Apollon, hin ljómandi.



**Forelskað?**

**Vís tað í Sosialinum**

# Tøkk

Hjartaliga takka vit øllum, sum sýndu samkenslu, tá góða mamma, vermamma, omma og langomma okkara

**Esther Davidsen**

doyði og vóru jarðað.

Takk fyri blómur og kransar, takk fyri gávur til Føroya Felag móti krabbameini og takk til tykkum, sum fylgdu henni til hennara seinasta hvíldarstað.

*Familjunnar vegna*

**Jógvan Elias, Jens Ib, Hannelisa og Jóna**



Í sambandi við at Røktarheimið á Mørkini í Streymnesi er liðugt, verður almenn móttøka á heiminum

**fríggjadagin 10. februar kl. 15.00 - 18.00**

**Øll eru vælkomin**

**Sunda Kommuna**



**Tín stóri dagur**

**Takka í Sosialinum**